## Nýggjur knock-out kongur

27 ára gamli Edwin Valero úr Venezuela er veruliga í ferð við at sláa sítt navn fast innan boksiheimin. Um vikuskiftið vann hann sín 25 sigur á rað, og enn hevur eingin mótstøðumaður staðið á beinunum allan dystin móti Valero. Fyrstu 18 dystirnar vann hann enntá upp knock-out í fyrsta umfarinum. Sunnunáttina vann hann so sítt fyrsta HM-heitið, tá hann í øðrum umfari fekk Antonia Pitalua í gólvið tríggjar ferðir, áðrenn dómarin steðgaði dystinum. Hetta var fyrsta tapið hjá Pitalua í átta ár.



## Champions League í kvøld

So verður farið undir fjórðingsfinalurnar í Champions League kappingini í fótbólti. Í kvøld eru tveir dystir á skránni, og eru hesir Villarreal-Arsenal og Manchester United-Porto. Í annaðkvøld spæla Barcelona-Bayern München og Liverpool-Chelsea. Hjá teimum, sum síggja rásirnar hjá Viasat, ber til at fylgja við beinleiðis, hvussu leikur fer í dystunum, sum allir verða blástir ígongd klokkan 19.45.



*Farandi og komandi. Jógvan Martin Olsen og Brian Kerr koma helst at tosa nógv saman komandi mánaðirnar*

*Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir*

# Væl arbeitt

**– Eg ivist ikki í, at Brian Kerr kemur við einari fótbóltsfilosofi, sum er eitt sindur øðrvísi enn tað, vit hava frammanundan, sigur John Petersen, sum kennir A-landsliðið bæði sum spælari og hjálparvenjari**

FÓTBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

– Mín fyrsti tanki var, at hatta var eitt veruliga stórt venjaranavn, tí Brian Kerr hevur vant eitt av teimum allarbestu A-landsliðunum í Europa, sigur John Petersen, sum við sínum 57 landsdystum er ein av okkara allarroyndastu landsliðsspælarum gjøgnum tíðirnar, umframt at hann eisini eitt skifti var hjálparvenjari, meðan Jógvan Martin Olsen var landsliðsvenjari.

– Eisini er tað spennandi, at hann ikki er komin spælaravegin, men tíðliga er byrjaður sum venjari. Eg hugsaði beinanvegin, at hatta var væl arbeitt av Fótbóltssambandinum.

John Petersen sigur seg ikki ivast í, at Kerr kemur við einari fótbóltsfilosofi, sum er eitt sindur øðrvísi enn tað, ið frammanundan er í Føroyum.

– Hann gongur inn fyri tøttum samstarvi við venjararnar, so um vit vilja taka ímóti, kann hann læra okkum nógv, heldur John Petersen, sum sær Brian Kerr sum helst besta boðið, ið hevur verið til tøka landsliðsvenjarasessin.

– Fyri kortum vóru trý venjaranøvn frammi sum kandidatar, og var hann uppií tá, hevði hann helst eisini tá verið tann fremsti av teimum kandidatunum. So eg ivist ikki í, at hetta er ein góður venjari, vit hava fingið.

# Nýggjur íblástur

**Uni Arge, sum er triðmest skorandi landsliðsspælarin hjá Føroyum nakrantíð, heldur Brian Kerr vera kærkomnan íblástur til føroyska fótbóltslandsliðið**

FÓTBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

– Eg havi sjálvur sagt, at okkum tørvaði bretskan íblástur, millum annað tí vit ikki ordiliga hava sæð tann fantastiska viljan, sum eyðkendi landsliðið onkuntíð tey fyrstu árini, sigur Uni Arge, sum við sínum átta málum í 37 landsdystum fyri Føroyar hevur skotið triðflest landsliðsmál.

– Bretar hava »spirit«, sum teir rópa tað, og eg ivist ikki í, at hesin írski venjarin, við øllum sínum royndum, kann gera mun í so máta. Tí er tað ein kærkomin nýggjur íblástur at fáa til føroyska fótbóltslandsliðið, at vit hava hugt aðrar vegir, nú vit hava fingið nýggjan landsliðsvenjara.

Sjálvur viðgongur Uni Arge, at hann gjørdist ikki sørt bilsin, tá hann hoyrdi navnið á nýggja venjaranum, tí Brian Kerr er altso ikki hvør sum helst.

– Eg hevði kanska ikki roknað við, at teir kláraðu at fáa fatur í einum kapasiteti, sum hevur verið A-landsliðsvenjari fyrr og eisini hevur klárað at fingið so góð úrslit við ungdómslandsliðunum, sigur Uni.

– Men Brian Kerr hevur víst, at hann dugir bæði at fáast við ungdóm og at fáa liðini fram í fremstu røð í Europa, umframt at hann dugir at fáa A-landsliðið hjá einum stórum landi heilt fram í fremstu røð. So tú kanst siga, at vit hava gjørt kvetti!



*Nýggi landsliðsvenjarin saman við nøkrum av starvsnevndarlimunum. Frá vinstru er tað Magnus á Stongum, Rúni Heinesen, Karl Vidtfeldt, Høgni í Stórustovu og Brian Kerr*

*Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir*

# Eitt sunt skifti

**– Hetta er eitt spennandi val, og vit fáa eitt skifti í, hvussu vit skulu hugsa fótbólt. Tað er sunt fyri okkum, sigur venjarin hjá EB/Streymi, Sigfríður Clementsen**

FÓTBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Sigfríður Clementsen, sum við EB/Streymi í fjør vann tað, ið var at vinna, er fegin um, at Føroyar hava fingið ein nýggjan landsliðsvenjara, sum kann føra til eitt skifti í føroyskum fótbólti.

– Brian Kerr hevur royndirnar og hevur havt Írland á høgum stigi. Hetta, hóast Írland ikki er so øgiliga nógv størri land enn Føroyar. Sum lond líkjast vit nógv, men Írland hevur sjálvandi fleiri toppspælarar uttanlands, fyrst og fremst í Onglandi, sigur Sigfríður.

– Hetta er eitt spennandi val, og vit fáa eitt skifti í, hvussu vit skulu hugsa fótbólt. Tað er sunt fyri okkum. Heldur ikki ger tað nakað, um vit fingu eitt orðaskifti um ungdómsfótbólt. Vit hava jú koyrt eftir donsku skipanini í fleiri ár, hóast vit ikki spæla akkurát líka sum danskarar, serliga ikki landsliðsfótbólt og altjóða fótbólt, sigur hann.

Sigfríður heldur, at føroyskur fótbóltsstílurin hinvegin líkist meira tí enska og norska stílinum, har stórur dentur verður lagdur á umstillingsspæl. – Fáa vit eitt orðaskifti um tað og hvussu vit menna tað, so kann tað bara vera gott, sigur hann.

Samanumtikið heldur venjarin hjá EB/Streymi, at Brian Kerr kann óivað læra føroyingar nógv, tí møguleikarnir at læra nakað nýtt eru avmarkaðir frammanundan.

– Júst tí er tað gott, at vit fáa ein kapasitet uttanífrá, sum fær okkum at hugsa og venda nøkrum tingum, tí vit verða ikki betri av okkum sjálvum, sigur Sigfríður Clementsen.